

foto: Ole Wich

*Í næsta Mondli verður frágreiðing frá rannsóknarferð, sum Arne Thorsteinsson landsantikvarur og Símun V. Arge fornfrøðingur hava verið á til ymisk støð, har fornar bygningsleivdir verða varðveittar, m.a. við innilokan.*



# KIRKJUBØMÚRURIN

## Arne Thorsteinsson

Kirkjubøur var í miðøldini bispasæti Føroya, og í hesum tíðarskeiði vórðu bygd tey stórfingnu bygningsverk, sum nú eru Føroya fremstu søguminni. Skilpmúraðu bygningarnir í Kirkjubø: Bispagarðurin við teimum báðum longu lonunum, kirkjan, sum tá var Føroya dómkirkja, múrurin, sum var ætlaður at vera tann nýggja dómkirkjan, men ikki varð liðugt bygdur, og triðja kirkjan, Líkhús, sum undirstrikar týdningin og veldið í hesum miðaldar kirkjuliga miðdepli, eru alt minnismerki, sum eru einastandandi í føroyska samfelagnum. Vit finna ikki her ta føroysku miðaldar bygdamentanina umboðaða, sum í landinum annars, men ta kirkjuligu hámentanina, merkt av sínum sambandi við altjóða kirkjuskipanina og altjóða samfelagið, sum vit kunnu vænta av landsins kirkjuliga, fíggjarliga og í stóran mun eisini politiska miðdepli. Umframt skilpmúraðu bygningarnar finnast í Kirkjubø eisini stokkabygd hús, sum í føroyskum sambandi eru eins einastandandi og teir skilpmúraðu.

Um okkum í dag dámar ta stóru miðsavnan av fíggjarorku og politiskari makt, sum miðaldarkirkjan umboðaði, ella ikki, er henda miðsavnan ein søguligur veruleiki, sum júst verður greidliga lýstur av muninum millum altjóða dámin í minnismerkjunum í Kirkjubø og traditionellu bóndahúsini við síni rót í norskari jarnaldarmentan, sum vit finna í landinum annars. Munurin er ógvisligur, men sum miðaldarsamfelagið var skipað, hevði henda umboðanin av veldi verið óhugsandi allar aðrar staðir í landinum enn í Kirkjubø. Har var fíggjarligi miðdepilin, og har hava vit tí í dag Føroya fremstu tjóðminni.

Tann týdning, Kirkjubøur hevur í søgu okkara, og tann týdning fornminnini í Kirkjubø hava í mentanararvi landsins ber næstan ikki til at yvirmeta. Men málið hevur eisini eina altjóða síðu. Bispasætið í Kirjubø var í miðøld ein liður í altjóða kirkjuskipanini og eitt av 10 bispasætum undir norska erkabispastólinum í Niðarós. Umframt erkabispasætið vóru tey 4 bispasætini í Noregi sjálvum: Bergen, Stavanger, Oslo og Hamar, og tey



6 vóru í skattlondunum: í Suðuroyggjum, Kirkwall í Orknoyggjum, Kirkjubøur í Føroyum, Skálholt og Hólar í Íslandi og Garðar í Grønlandi. Umframt á erkabispasætinum finna vit í dag bert í Kirkwall, Stavanger og Hamar monumental fornminni, sum kunnu sammetast vit tey í Kirkjubø. Bæði í Niðarós, Stavanger og Kirkwall eru miðaldarminnini tó innibyrgd í nútímans býarsamfelag, og onga aðra staðir enn í Kirkjubø og Hamar finna vit ta hugtakandi fríu placeringina av einum bispasæti í so at siga óbroyttum umhvørvi.

Í Kirkjubø hava vit tískil ábyrgdina av fornminnum, sum ikki einans eru okkara fremstu tjóðminni, men eisini hoyra til fremstu miðaldarminni í Norðurlondum. Fyri føroysku fornminnaumsjónina er Kirkjubøur tí ein serstøk ábyrgd, og nøkur ár herfyri gjørdu vit av av álvara at taka spurningin um varðveitingina av Kirkjubømúrinum til viðgerðar.

Síðst í mai mánaða 1986 fekk Føroya Fornminnissavn frágreiðing frá kanning sum í august mánaða 1985 varð gjørd av standinum í múrinum. Kanningin var umbiðin og goldin av savninum við fíggjarligum stuðli frá Føroya Landsstýri. Kanningin hevði til endamáls at fáa til vega nágreiniliga lýsing av tí standi Kirkjubømúrurin er í, sum Føroya Fornminnissavn kundi nýta sum grundarlag undir ætlanum sínum um umvælingar og onnur tiltøk til vernd av múrinum.

Kanning og frágreiðing vórðu gjørd av Curt von Jessen, arkitekti,við hjálp frá verkfrøðingunum Eduard Troelsgaard og Preben Hansen. Umframt lýsingina av standinum er í frágreiðingini eisini eitt yvirlit yvir tey umvælingararbeiði, sum gjørd eru gjøgnum tíðirnar, og sum upplýsingar finnast um, harumframt stutt, almenn lýsing av teimum umvælingararbeiðum, sum arkitekturin metir eiga at verða gjørd.

Tá Føroya Fornminnissavn á hesum sinni tók spurningin um varðveiting av Kirkjubømúrinum upp, var tað við tí máli fyri eyga at fáa gjørt eina gjøgnumgrípandi, haldgóða og væl fyrireikaða umvæling. At fyrireikingararbeiðið fór at taka drúgva tíð, var savninum greitt longu frá byrjan.

Fyrsta konkreta stigið í fyrireikingararbeiðinum var nevnda kanning við frágreiðing, eitt sera nágreiniligt arbeiði, sum gevur eina gjølliga lýsing av tí standi,múrurin og einstøku partar hansara eru í. Frágreiðingin er, sum ætlanin var, eitt frálíkt grundarlag undir komandi viðgerðini.

Næsta stigið var ein faklig antikvarisk viðgerð av spurningunum um, hvørjar princippiellar leiðir vit áttu at halda í varðveitingararbeiðinum, og hvørjum konkretum tiltøkum miðað átti at verða ímóti. Frágreiðingin varð m. a. latin antikvariskum ráðgevum, sum vit so hava kunnað skift orð við um spurningarnar, og sum síðan hava latið savninum viðmerkingar og metingar teirra. Longu undan og í byrjanini av hesum stigi tóku seg tíverri upp trupulleikar av ymsum slag, sum hava tarnað viðgerðini og hava ført við sær, at hon gjørdist drúgvari enn hon kundi verið. Hesin liður í arbeiðinum er tó loksins komin at enda, og fornminnissavnið er til reiðar at leggja málið fyri avvarðandi myndugleikar til støðutakan.

Í sambandi við fornminnavarðveiting eru ymiskar princippiellar leiðir at ganga. Tær kunnu leysliga bólkast í: 1. Lata fara. 2. Endurnýggja. 3. Varðveita. 4. Verja, og sum allar hava sínar talsmenn

1. leiðin, at lata fara, verður her nevnd, ikki tí at vit taka hana í álvara, men heldur tí at tað veruliga eru fólk, sum meta, at fornminni eiga at sleppa at doyggja ein natúrligan, vakran og romantiskan deyða, uttan at vit eiga at ávirka ta natúrligu gongdina. Hetta er ikki leiðin, fornminnissavnið ætlar at halda.

2. leiðin, at taka burtur alt, sum verður mett skirvisligt, tært, ov ljótt o.s.fr, endurgera tað og soleiðis byggja upp aftur tað burturtikna úr nýggjum tilfari, so fornminnið verður so gott, sum var tað nýtt, man hava verið vanligasta leiðin innan fornminnaumsiting. Vit kenna hana aftur í umvælingum av træhúsum t.d. Er klædningurin rotin, verður hann skiftur. Tað sama við vindeygum, sperrum, syllum, stavum og øðrum bygningapørtum. Henda leiðin kann vera neyðug, tá húsini eru í brúki og framvegis skulu vera tað. Tá er eisini í allarflestu førum neyðugt at broyta, modernisera og seta upp nútímans hentleikar. Hetta er prísurin fyri, at húsini kunnu verða nýtt og virka í nútíðarsamfelagnum, soleiðis at teir bygningapartar, ið órørdir eru, hóast alt verða varðveittir.

Henda vanliga leiðin er vandamikil, tí at markið millum, hvat eigur at verða endurnýggjað og hvat ikki, er sjáldan greitt, og mangan munnu menn gera í so nógv av at endurnýggja. Dømini um "gomul" hús, har ikki eitt gamalt sprek er at finna, eru ikki heilt fá. Mong kenna helst søguna um ta 400 ára gomlu øksina. Hon hevði fingið skaftið skift tríggjar ferðir, men høvdið bert tvær reisur. Søgan er løtt at fata, og tess undarligari er, at vit fáast at billa okkum inn, at eini hús, sum eru bygd í 1987, eru gomul. Fyri fornfrøðingin, sum nýtir gomul hús sum heilmildartilfar um gamlar byggisiðir m. a., eru slík hús virðisleys, hóast tey eru bygd "fullkomiliga sum tey gomlu", sum nú liggja á ruskdunganum.

Enn ein vandi er í hesi leið, tí hvussu fullkomið er tað fullkomna? Tað endurnýggjaða verður sjáldan ein fullkomin endurgáva av tí, sum var framman undan. Tað verður sum oftast betrað og pyntað. Bygningapartar, sum eingin okkara hevur sæð, verða "endurskaptir", t.v.s. okkara hugmynd av, hvussu tað kann hava verið, verður skapað í træ ella gróti. Tá komið er so langt, er stigið stutt til at "endurbyggja" tann bygningin, sum langt síðan er farin,ella "fullføra" tann ófullførda, hóast eingin veit, hvussu hann var ella var ætlaður at verða. Slíkt er søguliga sæð virðisleyst í besta føri,og kann volda stórskaða í versta føri.

Eitt sera týdningarmikið skjal er varðveitt úr miðøld. Eg hugsi um Seyðabrævið, sum Erlendur biskupur átti stóran lut í, sami maður, sum eftir hvat summir halda, hevur grundað Kirkjubømúrin. Neyvan hevði nakar hugsað um at klipt burtur tað slitna og líma avskrivt inn í staðin. Neyvan hevði nakar hugsað um at pynta teir bókstavir, ið ikki eru nóg vakrir ella skriva oman á kámar ella ólesiligar bókstavir. Neyvan hevði nakar hugsað um at yrkt aftur at Seyðabrævahandritinum ella umyrkt tað eftir egnum tykki. Fyri fornfrøðingin er Kirkjubømúrurin eins týdningarmikið skjal úr miðøld og Seyðabrævið er tað, og hóast tað bæði hevur verið drigið frá og yrkt aftur at Kirkjubømúrinum í øldir, kann tað ikki vera okkara uppgáva at yrkja víðari, tá vit eru meðvitandi um, at tað er varðveiting og trygging av týdningarmiklum søguskjali, sum er veruliga uppgáva okkara. Henda uppgávan gerst munin lættari av, at Kirkjubømúrurin ikki verður nýttur og ikki eigur at verða nýttur til nakað annað enn at vera eitt søguskjal, um so er, at nýtslan setur ávís krøv, sum ikki kunnu lúkast uttan serlig tiltøk.

Nú er longu 3. leiðin, varðveiting, konservering, av tí, sum til er, umrødd og grundgivin. Úr einum søguligum, antikvariskum sjónarmiðið er hetta einasta gongda leið at tryggja heimildarvirði í fornminninum. Alt annað er neyðloysnir. Henda møguleika hava vit í Kirkjubømúrinum, og hetta er leiðin, Fornminnissavnið hevur sett sær fyri at ganga. Hetta ber í sær, at endamálið við komandi umvælingum verður at tryggja stabilitetin í múrinum og, so frægt tað er gjørligt, at forða fyri at náttúrukreftirnar framhaldandi skaða hann.

Hvussu væl ein konservering av múrinum enn verður gjørd, fer hon ikki at kunna forða náttúrukreftunum í framvegis at herja á. Sum frá líður fara hol aftur at koma á nýggju fugurnar, væta og frost sleppa fram at aftur, og náttúrliga erosiónin verður als ikki tarnað av konserveringini. Hetta hevur fingið menn at hugsa um 4. leiðina, at verja múrin móti niðurbróting við at loka hann inni, og er hetta uppskotið sett fram av Knud J. Krogh, savnvørði, sum í hesum eins og øðrum málum hevur virkað sum ein av trúgvastu ráðgevum savnsins. Besta dømi um fornminnavernd við innilokan, sum eg veit um, finst júst í Kirkjubø. Har er aldargamla roykstovan so lítið ávirkað av veðri og so væl varðveitt, sum hon er, júst tí hon altíð hevur staðið innandura. Munur er á varðveitingini av roykstovuni og stokkastovunum, sum hava staðið uttandura, og tískil hava verið endurnýggjaðar og broyttar fleiri ferðir.

Við einihvørji innilokan skuldi borið til at fingið tamarhald eisini á erosiónini, og ein innilokan verður at føra við sær, at tann neyðuga konserveringin fær heilt aðrar fyritreytir. Hon verður nógv minni umfatandi og nógv kravminni. Hetta at loka múrin inni er ikki bert sum at siga tað. Tað eru tvinni vandamál, sum í fyrstu atløgu falla í eyguni. Tey eru: 1. monumentala virðið í múrinum og 2. møgulig negativ hjáárin av teirri veðurlagsbroyting, vit geva múrinum við eini innilokan.

Monumentala virðið í múrinum er sera stórt, og ein avgjørd treyt í sambandi við eina innilokan má tí vera, at hetta virðið eisini verður varðveitt í størst møguligan mun, eins og heildin og umhvørvið eigur at verða nervað sum minst. Hetta verður at seta sera stór krøv til tann arkitekt, sum fær hetta arbeiðið litið til.

Eftir uppskoti Knud J. Kroghs eru tvinnir møguleikar fyri innilokan. Vit kunnu tekja múrin og verja ávísar týdningarmiklar og serliga hóttar partar av útveggjunum við t. d. glasi, eins og gjørt hevur verið við bispaborgina í Hamar. Ella vit kunnu loka hann heilt inni - í glasi væntuliga - eins og ætlanin er at gera við dómkirkjuleivdirnar í Hamar. Hvør av hesum møguleikum fer at verða valdur, ber ikki til at siga í løtuni.

Áðrenn farið verður undir at umrøða hitt vandamálið: møgulig negativ hjáárin av innilokan, skal verða gjørt eitt yvirlit yvir tær náttúrukreftir, sum vit vita ella illteinkja fyri at ávirka Kirkjubømúrin.

Burtur úr frágreiðing Curt von Jessens ber til at seta saman eitt yvirlit yvir nakrar av hesum kreftum, og fari eg at meta um, hvussu tær hvør sær kunnu verða tálmaðar, hóast ávirkanin einamest kemur av samspæli millum fleiri kreftir.

**Setingar.** Múrurin er partvíst grundaður á hellu, partvíst á morenuleir. Grundin tykist yvirhøvur at vera nóg sterk og trygg; men ymiska tilfarið í undirlendinum ger, at múrurin setir seg ymiskliga, so rivur koma í hann.



Hetta fer óivað at vera so eisini í komandi tíðum, við tí úrsliti, at hóast rivurnar verða tættaðar, fara tær skjótt at skrædna sundur aftur. Rivur, sum koma í av hesi orsøk, er neyvan nakað at gera við, annað enn at ansa eftir, at múrurin viknar ikki ov nógv.

**Hitaspreinging.** Tá steinur verður hitaður av sólarljósi, kann spenningur koma í steinin, tí steinskorpan verður mest hitað og bólgnar meir enn steinurin annars. Hetta kann hava við sær, at skorpan støkkur og loysnar frá.

Hesum ber neyvan til at forða fyri, men hugsandi er, at einhvør regulering av beinleiðis sólarljósi kann verða gjørd í sambandi við eina innilokan.

Eisini kann hitaspenningur koma í millum múrpartar í sólarljósi og múrpartar í skugga, og rivur kunnu standast av hesum.

**Væta.** Múrurin lekur, og hann hevur likið í mong ár. Vætan kemur inn í múrin ymsar vegir. Múrkrúnan lekur, og tær tómu fugurnar í múrinum leka. Eitt tað týdningarmesta úrslit av gjørdu kanningini er tó ávísanin av, at tað nógva vatnið setir inn í múrin í teimum støðum, har støði er sett til ætlaðu hválvini á innsíðuni av múrinum.

Vætan er í sjálvari sær skaðilig. Hon kann bloyta skilpin í múrinum og í fugum, so bindievnið í skilpinum viknar. Eisini ávirkar vætan mineral í grótinum, so tað verður poknut, og aðrar kreftir sleppa fram at at máa víðari. Vætan er grundarlag undir gróðri, sum spreingir frá sær, og undir frostspreingingum.

Í hvussu er teoretiskt ber til at tætta allar fugur, rivur og op, so væta ikki sleppur inn í múrin, men tað krevur gjølligt eftirlit og røkt eisini eftir, at arbeiðið er gjørt, so fugur og rivur verða tættaðar aftur, so hvørt tær bresta. Vætuárinið á grótið sjálvt er lítið og einki at gera við.

Verður múrurin innilokaður, ber til at halda vætuni heilt burtur frá honum, og verður tá ikki neyðugt at halda fugur og rivur vatntættar. Tá er eisini møguleiki fyri at skilpurin í múrinum stadnar og vinnur bindievni sítt aftur.

**Frost.** Vætan inni í múrinum kann frysta og geva frostspreingingar. Sama er við vætuni, sum er komin inn í grótið sjálvt. Frostið kann spreingja frá sær, tá vætan í poknum og rivum frystir, og skorpur flusna uttan av grótinum. Eins og við vætuni kann frostið møguliga haldast burtur frá múrinum sjálvum, men ikki frá grótskorpuni. Bert innilokan kann loysa henda trupulleika heilt.

**Vindur** hevur skilliga sín heilt stóra lut í, at máað verður burtur av grótinum í múrinum. Har ábart er, er múrurin mest skaddur. Vindurin ber við sær smá sandkorn, sum skúra steinin. Hann slítur leyst tað, sum er skatt av øðrum ávum, og hann kann fáa evarska smá, leys korn at mala í poknum í steininum og grava stórar djúpar kullur í hann. Hvat vit enn gera við múrin, fer vindurin framvegis at leika í og máa burtur av honum. Einasti møguleiki at tálma vindinum er aftur innilokan.

**Erosiónin,** burturmáanin av grótinum í múrinum stendst sostatt av fleiri ymiskum kreftum, sólarljósi, vætu, frosti, vindi og møguliga øðrum kreftum við, sum hvør sær og í samspæli

hvør við aðra gera sítt til, at múrurin forferst.

Erosiónin hevur óivað staðið við í øldir, og nú hevur hon sett síni sjónsku merki í múrin. Um tað einans var ótilgjørt grót, ið máað varð burtur av, var skaðin ikki tann stóri. Men talan er her um høggmyndir og annað skurðverk í føroyskum gróti, listaverk, høgd í miðøld, sum spakuliga eru við at forfarast, og vit kunnu einki gera fyri at forða hesum annað enn at verja tey móti framhaldandi erosión við at loka múrin inni.

Í frágreiðing Curt von Jessens verða eisini nevnd sár og støkkir av mannaávum í skurðverkum.

Teir vansar, sum nevndir eru í frágreiðingini, eru neyvan teir einastu. Nógv hevur í seinastuni verið tosað og skrivað um súrt regn, svávulsýru, sum orsakað luftdálking regnar niður av himni. Kanningar okkara benda tó fyribils á, at í Føroyum hava vit ikki nær í námind teir trupulleikar av hesum, sum tey inni á meginlandinum hava at dragast við. Um múrurin yvirhøvur er skaddur av súrgu, er enn óvist, men heldur luftdálkingin áfram inni á meginlandinum, man tað vera ivasamt, um vit framvegis sleppa undan.

Meira álvarsamur er vandin fyri saltspreingingum. Í Danmark t. d. verða saltspreingingar roknaðar millum tær fremstu orsøkirnar til erosión. Tær stava einamest frá salti, sum um vetrarnar verður stroytt á vegirnar. Tá hugsað verður um sjórokið í Kirkjubø, er møguleiki fyri, at salt er í tí vætuni, sum situr í múrinum og í grótinum. Um nú salt fær fastan form, krystalliserast, kann tað spreingja frá sær í størri mun enn frost. Vatn, ið frystir, víðkast 9%, men ávís saltsløg víðkast 308%, tá tey krystalliserast. Hesin spurningur verður tí gjølliga kannaður í sambandi við varðveitingina av múrinum. Óneyðugt at siga tað, men innilokan av múrinum fer eisini at halda sjórokinum burtur frá honum.

Higar til hava mangar orsøkir verið nevndar fyri, at múrurin eigur at verða innilokaður, men vandi kann standast av óumhugsaðari innilokan. Vit eiga eisini at hugsa um **møgulig negativ hjáárin av innilokan.** Hesin spurningur verður viðgjørdur í løtuni, og ikki ber til enn at fáa fult yvirlit yvir tey hjáárin, sum vit eiga at vera før fyri at vita um, áðrenn innilokan fer fram, so móttiltøk kunnu verða gjørd, men onkrir møguleikar kunnu verða nevndir.

Ein í minsta lagi teoretiskur vandi við innilokan er, at undirlendið verður ov turt, serstakliga um gólvið í múrinum samstundis verður drenað, so vatnið, sum seyrar oman úr erva eisini verður veitt burtur. Múrurin kann tá seta seg upp aftur meira, har hann stendur á morenuleiri,og rivna meira.

Annar møguligi vandin er aftur saltið. Sum øll vita, krystalliserast salt til fastan form, tá vætan, tað er uppløyst í, tornar burtur. Eitt av høvuðsendamálunum við eini innilokan av múrinum er júst, at hann skal fáa tað turt og gott, men situr salt uppløyst inni í honum, økist vandin fyri krystallisering og saltspreinging,jú turrari og lýggjari verður. Hesir og aðrir spurningar mugu verða greiddir, og móttiltøk móti ótilætlaðum hjáárinum klár at seta í verk, áðrenn ein innilokan kann verða framd.

Uttan mun til, hvussu ein innilokan kann verða gjørd, og hvørjir spurningar í hesum sambandi eiga at verða umhugsaðir, og uttan mun til, hvussu nágreinilig ein komandi konservering av múrinum eigur at verða gjørd, mugu vit tryggja okkum, at múrurin ikki rapar. Stendur hann at rapa, sum ført hevur verið fram? Tær kanningar, sum gjørdar vórðu um summarið 1985, umfataðu eisini stabilitetin í múrinum. Í frágreiðingini er einki, sum bendir á, at størri múrpartar eru í vanda fyri at rapa. Talan tykist ongastaðni at verða um, at heilar múrfláir t. d. eru loysnaðar frá kjarnuni. Fornminnissavnið hevur tí ikki mett tað ótilráðiligt at nýta neyðuga tíð til viðgerðar og umhugsan, áðrenn lopið verður á múrin.

Annað mál er, at einstakir steinar kunnu vera so mikið loysnaðir, at teir kunnu detta. Serstakliga vil hetta kunna koma fyri í vestara enda, har steinarnir í ovara parti av múrinum als ongar fugur hava og sostatt ikki eru bundnir saman. Einstakir teirra eru eisini loysnaðir frá kjarnuni og skotnir út,so teir kunnu detta og møguliga taka aðrar steinar við sær. Nú Fornminnissavnið í høvuðsheitinum hevur gjørt sær greitt, hvussu verndin av Kirkjubømúrinum eigur at fara fram, ber eisini til at definera ávís tryggingartiltøk, sum kunnu gerast uttan mun til, hvussu arbeiðini annars verða løgd til rættis.

Fornminnissavnið er tískil nú til reiðar at fara undir at útarbeiða eitt innilokingarprojekt og eitt konserveringsprojekt í sambandi við múrin. Men vit eru eisini til reiðar at fara undir ávís tryggingartiltøk samstundis.

Fyrst verða tey støð, har frágreiðingin bendir á møguleikar fyri leysum steinum, eftirhugd av nýggjum, og tryggingartiltøk og ávís onnur hóskandi tiltøk fara at kunna verða sett í verk til várs.

Tað hevur áður verið ført fram, at fornminnini í Kirkjubø eru einastandandi í føroyskum samanhangi og týdningarmikil í norðurlendskum samanhangi. Hetta merkir tíverri eisini, at trupulleikarnir har eru einastandandi fyri føroysku fornminnaumsjónina, sum ikki hevur royndir við líknandi fornminnum at læra av. Vit hava tó her serstakar skyldur, bæði mótvegis søgu okkara og norðurlendsku miðaldarsøguni, sum múrurin er partur av. Vit hava skyldu til at ansa eftir, at hann ikki forferst, men vit hava fyrst og fremst skyldu til at vissa okkum, at tað, vit gera, veruliga er múrinum at gagni, so vit ikki í bráðræsni gera múrin til enn eitt av hesum byggimistøkum, sum eru vorðin gerandiskostur í Føroyum. Vanligir bygningar, vegir og tílíkt kann verða umafturgjørt, men vit hava bert ein Kirkjubømúr. Honum hava vit ikki ráð at eksperimentera við.

~


**Mondul**

- *kemur út 3 ferðir um árið*
- *fæst ikki í leysasølu*
- *øll kunnu gerast haldarar*
- *haldaragjaldið er 50 kr. um árið.*
  *Ringið ella skrivið til Fornminnissavnið, Boks 1155, 110 Tórshavn - tlf. 12259*